# Løgmansrøðan 1990

## 1. Politiska gongdin

Løgmansrøðan fyri einum ári síðani - á ólavsøku 1989 - var merkt av, at vit høvdu havt eina samgongukreppu í juni 1989, og at landsstýrið, sum stóð aftanfyri frágreiðingina frá løgmanni tá, bert var ein mánaða gamalt.

Longu henda mánaðin hevði samgongan fingið samtykt týðandi tiltøk, sum skuldu bøta um búskaparligu viðurskiftini.

Eisini boðaði tann løgmansrøðan frá fleiri ætlanum á teim ymisku samfelagsøkjunum, ætlanir, sum allar vóru merktar av sparitiltøkum innan tað almenna og bygnaðarbroytingum innan vinnulívið.

Uppgávan hjá landsstýrinum og samgonguni hevur verið at laga samfelagið til tær neyðugu broytingarnar, sum máttu og mugu koma, sum ein beinleiðis fylgja av tí búskaparligu og fíggjarligu støðu, samfelagið og vinnulívið var komið í.

Neyðugt hevur tí verið við lóggávu, sum hevur havt beinleiðis tilknýti til landskassan, eitt nú skerjingar á fíggjarlógini. Harumframt koma ymiskar fylgilógir, sum hava havt aðrar samfelagsskerjingar við sær, og beinleiðis lóggáva viðvíkjandi bygnaðarbroytingum í høvuðsvinnuni. Henda seinast nevnda lóggáva er júst avgreidd fyri fáum døgum síðani.

## 2. Búskaparliga gongdin

Landsins búskapur merkir framvegis fylgjurnar av tí ovurstóra virkseminum, sum náddi hæddina í 1988. Somuleiðis hevur høvuðsvinnan somu árini og eisini aftaná havt vaksandi trupulleikar at dragast við, trupulleikar, sum vísa seg við at fleiri skip og virki eru farin ella eru við at fara av knóranum.

Í frágreiðingini á ólavsøku í fjør varð sagt frá, at nettoskuld Føroya til útheimin við árslok 1988 var uppgjørd til 6,7 mia. kr. og var hetta tal sera skelkandi. Á heysti 1989 var endaliga nágreiniliga uppgerðin yvir samlaðu føroysku skuldina til útheimin og ágóði okkara í útheiminum uppgjørd. Tað vísti seg, at nettoskuldin var 7.755 mió. kr. ella eina milliard hægri, enn hagtølini søgdu frá á ólavsøku 1989.

Tilsvarandi uppgerðin við árslok 1989 sýnir eina nettoskuld til útheimin uppá 8.429 mió. kr. ella ein vøkstur uppá 674 mió. kr.

Gongdin í 1989 hevur verið tann, at úrslitini av bæði handilsjavnanum og gjaldsjavnanum eru batnað við heilt týðandi upphæddum í mun til 1988.

Bæði fyri 1989 og 1990 hevur landsstýrið lagt stóran dent á at skerja fíggjarlógina, bæði fyri at minka um virksemið og tryggja landskassan so væl sum møguligt. Hóast nógv hevur verið gjørt fyri at halda givnu játtanirnar, hevur hetta ikki eydnast nóg væl, serliga ikki har lógar- og sáttmálabundnar útreiðslur ikki eru lækkaðar nóg skjótt. Harafturat hevur minkandi virksemið, sum eisini er ein ætlaður partur av landsstýrisins politikki, havt lægri inntøkur við sær, serliga tollinntøkur til landskassan.

Størsti meinbogin fyri landskassan hevur tó verið tey ovurhonds stóru veðhaldsútleggini, samanlagt umleið

610 mió. kr. frá 1. januar 1988 til 20. juli 1990.

Fylgjan hevur verið hall á landskassaroknskapinum, íroknað veðhaldstap í 1988 og 1989 og væntandi eisini í 1990. Hetta hevur so aftur havt við sær, at landskassin hevur verið noyddur at taka lán fyri at klára sínar skyldur.

## 3. Nøkur búskapar- og fíggjartøl

Í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna eru sum vanligt uppgerðir yvir búskapargongdina og verður víst til hesi skjøl.

Her skal kortini verða nomið við nøkur av høvuðstølunum.

Handilsjavnin fyri 1989 vísir eitt lítið hall uppá umleið 10 mió. kr. ella stórt sæð javnvág. Av tí at útflutnings- og innflutningsvirðið av skipum var nærum tað sama, er javnvág í, um vit so telja skip við ella ikki. Í 1988 var innflutningurin av skipum væl størri enn útflutningurin, og tá var samlaða handilsjavnahallið 876 mió. kr. Betranin uppá uml. 865 mió. krónur stavar frá:

| | |
|---|---|
| øktum útflutningi | 275 mió |
| minkandi nettoinnfl. skip | 290 - |
| minkandi innfl. annars | 300 - |
| | 865 mió |

Fyribils tølini fyri fyrra hálvár 1990 vísa aftur eina lækking av innflutningsvirðinum og eina minni lækking av útflutninginum. Væntandi verður yvirskot á handilsjavnanum samanlagt fyri 1990.

Gjaldsjavnahallið í 1989 var eisini væl lægri enn í 1988, 819 mió ímóti 1582 mió. Við kursvinningi er uttanlandsskuldin kortini bert økt 674 mió. í 1989. Málsetningur landsstýrisins var at minka gjaldsjavnahallið niður í umleið 500 mió. í 1989, og er hesin málsetningur næstan rokkin.

Næsti málsetningur er at fáa javnvág í gjaldsjavnaroknskapin í 1990.

Gjaldføri landskassans versnaði aftur nógv í 1989 og í fyrru helvt av 1990. Aftaná tey rættuliga stóru yvirskotini í 1986 og 1987 hava 1988 og 1989 víst hesi úrslit:

| | 1988 | 1989 |
|---|---|---|
| Vanligt úrslit | 32 | -461 |
| Veðhaldsútlegg | -205 | -267 |
| Samanlagt | -173 | -728 |

Í 1988 roknskapinum vóru inntøkurnar (tollur og skattur) umleið 183 mió. størri enn ætlað á fíggjarlógini. Men meirnýtslan var umleið á somu upphædd, soleiðis at roknskaparúrslitið varð sum longu sagt frá.

Í 1989 var støðan tann, at tollur og skattur vóru umleið 126 mió. minni enn ætlað. Meirnýtslan var umleið 335 mió. kr. Her er eykajáttanin til fiskivinnuna frá juni 1989 íroknað.

Fyrra hálvárið 1990 vóru skattur og tollur umleið 890 mió. kr. Helmingurin av ætlaðu upphæddini á fíggjarlógini 1990 er 1027 mió. kr.

Tær lægru landskassainntøkurnar eru ein fylgja av tí minkaða virkseminum í landinum, og eru samstundis ein partur av prísinum, sum gjaldast skal fyri at fáa gjaldsjavnahallið burtur. Men slík hall sum seinastu árini kann landskassin ikki bera í longri tíð. Tískil verða uppaftur størri skerjingar á fíggjarlógini neyðugar eins og betri eftiransan av nýtsluni.

Landsstýrið veitir stórt sæð ikki fleiri veðhald til vinnulívið og ein stórur partur av teim neyðlíðandi veðhaldunum eru nú goldin, so veðhaldsútleggini fara at minka heilt nógv.

Samlaðu privatu veðhaldini, ið fyri tveimum árum síðani vóru omanfyri eina mia. kr., eru nú niðurgoldin so nógv, at landskassin nú veðheldur fyri minni enn 600 mió. kr.

Lønargjaldingarnar seinru árini hava verið hesar:

| | 1. hálvár | 2. hálvár | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| 1988 | 2.042 | 2.210 | 4.252 |
| 1989 | 2.146 | 2.264 | 4.410 |
| 1990 | 2.020 | | |

Upphæddirnar eru ávirkaðar av lønarhækkingum sambært sáttmálum og prístalsskipanini. Hækkingar hava framvegis verið í almennum lønum, sum fyri størsta partin eru fastar, meðan lønarupphæddirnar innan tað privata eru minkandi. Hesar lønir eru fyri tað mesta tímalønir og merkja tí skjótari búskaparligu tálmingina.

## 4. Búskaparligar ætlanir, tiltøk og framtíðarvánir

Tey tiltøk, sum samgongan hevur framt, hava givið úrslit viðvíkjandi høvuðstrupulleika okkara, nevniliga gjaldsjavnahallinum. Men enn er langt eftir á mál, og sjálvt tá ið hallið verður broytt til avlop, eru fleiri aðrir trupulleikar at loysa.

Eitt er at fáa avlop aftur í landskassanum. Hetta verður ikki gjørt við skattahækkingum, heldur tvørturímóti. Tað eru útreiðslurnar sum framhaldandi skulu lækkast. Sum er hava vit ein rættuliga vælvirkandi almennan sektor og soleiðis skal tað eisini vera í framtíðini.

Men júst av teirri orsøk eigur hann alla tíðina at verða broyttur og rationaliseraður eins og aðrir partar av samfelagnum. Hann má ikki stirðna í vanahugsan og bert víðkast, tá ið fleiri almennar tænastur eru neyðugar.

Fyri at fáa avlop á figgjarlógini verða tí útreiðsluskerjingar neyðugar. Tað kann tí eisini hava við sær, at størv verða strikað. Eitt týðandi alternativ til hetta er, at lønarlagið verður lækkað.

Henda seinasta spurningin um at lækka lønarlagið og skattastøðið skal eg koma aftur til undir viðgerðini av skattamálum.

Íløguætlanir fyri alment virksemi eru gjørdar, og eru upphæddirnar settar til 550 mió. kr. árliga. Her ræður bæði um at halda íløgurnar niðri á hesi upphædd og eisini at ansa eftir, at tær ikki verða lægri.

Privatu íløgurnar eru nógv minkaðar seinastu tvey árini. Í fyrsta umfari er hetta gott, men sum fráliður verður tað neyðugt, at virksemið á hesum øki aftur økist - ikki fyri íløgunnar skuld, men fyri at økja um framleiðsluvirksemið.

Seinastu tíðina hevur tað eisini víst seg, at íløgukostnaðurin er lækkaður og er komin niður á eitt normalari støði.

Umframt tað, at føroyska lønarlagið er ov høgt, so er eisini rentustøðið hægri, enn tað átti at verið. Skattligu viðgerðirnar av rentuni skal eg koma aftur til seinri, men her verður sagt frá, at landsstýrið, landsbankin og føroysku peningastovnarnir hava spurningin um rentustøðið til viðgerðar og verður roynt at lækka tað.

Grundarlagið undir øllum samfelagsbúskapinum er eitt væl virkandi vinnulív, sum gevur eitt búskaparligt avlop.

Tí er ikki nóg mikið bert við almennum tiltøkum, sparingum og skerjingum, men einum politikki, sum gevur vinnuni - í víðasta týdningi - møguleikar at virka innan eina so fría marknaðarskipan sum møguligt, bæði innanlands og á heims-

marknaðinum.

Landsstýrið hevur tí gjørt uppskot, og fingið tey samtykt, sum miða ímóti, at fiskivinnan fær nógv fríari ræsur at virka undir - tó við skerda tilfeingi hennara - eins og meiri kapping.

Sum greitt verður frá seinni, eru vónir um betri marknaðarmøguleikar, og størri møguleikar fyri produktvali á europeiska marknaðinum.

Búskaparliga endurnýggjanin av føroyska samfelagnum byggir tí á tvær høvuðsfortreytir:

1. Størri inntøka og framleiðslu í vinnuni, grundað á betri marknaðarmøguleikar, fríari kapping, nýhugsan og at gerast meira óheftir av almennari hjálp og einumvaksandi parti av lønarinntøkuni til borgaran eins og størri samansparing.

2. Ein almennan politikk við størri eftiransan og sparsemi innan tað almenna.

Hetta er eisini avgerandi fyri lánsmøguleikarnar uttanlands.

## 5. Fiskivinnumál

### Skipaflotin

Í løgmansrøðuni 1989 varð boðað frá nógvum ætlanum, sum allar høvdu til endamáls at broyta bygnaðin í fiskivinnuni, soleiðis at fiskivinnan í størri mun hvílir í sær sjalvari uttan almennan studning.

Eitt rúgvusmikið lógararbeiði er nú avgreitt, sum setir hesar ætlanir í ein lógarkarm. Politiska viðgerðin av hesum broytingum, sum er ein grundleggjandi broyting í kósini

sammett við lógarverkið, sum hevur verið grundarlagið seinastu 15-20 árini, gjørdist sera drúgv. Onkur vil halda ov drúgv; men einki løgið er í, at tað tekur tíð at venda skútuni, eftir at hon í so nógv ár hevur ligið føst á einari kós.

Henda drúgva viðgerð hevur ført við sær, at tað ikki hevur verið møguligt at fáa eitt so skipað orðaskifti við vinnufeløgini, sum landsstýrið vildi. Hetta merkir tó ikki, at vinnan ikki hevur havt árin á uppskotini. Møguleikar hava við fleiri høvi verið til at fáa hugsanir frá einstaklingum og vinnufelagsumboðum.

Uppritið um fiskivinnuna, sum var grundarlagið undir lógarverkinum, hevur verið almannakunnugt rættiliga leingi, og hevur í almennum orðaskifti fingið nógvar viðmerkingar. Hetta er tó ikki hitt sama sum eitt skipað orðaskifti og hoyring hjá vinnufeløgunum.

Við lógini um fiskivinnuráð er skipanin tó løgd í fastar karmar framyvir og hevur landsstýrið stóran áhuga fyri, at hugsanirnar hjá vinnufeløgunum eru greitt lýstar í málsviðgerðini í fiskivinnumálum framyvir.

Tað lógarverk, sum nú er lagt fram, er neyvan endin á teim neyðugu broytingum, sum fremjast mugu fiskivinnuni til frama.

Lógirnar um prísásetan, umskipan av studningum, umskipan av luttøku hins almenna í góðskumeting, ráfiskabýti, royndaruppboðssølu, vraking og um upphøgging av ovurveiðiorku bera øll á tað borðið, at vinnuumhvørvið hjá fiskivinnuni batnar.

Hetta merkir eisini yvir stytri tíðarbil, at broytingar kunnu raka einstakar vinnufyritøkur, men hetta slepst ikki undan í tí truplu tillaging, sum er alneyðug.

Við at lógarfesta dagsstudning til fiskimenn er tó munandi trygd veitt fiskimonnum í hesum broytingartíðarskeiðið. So hvørt sum ovurveiðiorkan hvørvur, og veiðiúrslitini hjá einstøku skipunum batna, fáa hesar trygdir tó minni týdning. Lógarverkið er sum nevnt ein byrjan, og summir partar eru ikki ætlaðir at standa leingi.

Bert orðaskiftið, áðrenn lógirnar eru komnar í gildi, hevur tó longu havt ávirkan rætta vegin. Vit hava longu sæð dømi um, at flakavirkini eru farin at laga seg eftir einum fríari prísi, sum oftast er omanfyri teir prísir, sum vóru eftir gomlu skipanini. Eitt týdningarmikið orðaskifti er eisini byrjað um broytingar í marknaðarføring og sølu av fiski.

Fyri mongum tykjast trupuleikarnir størri enn glottarnir, og einki er yvir at dylja at í hesum broytingartíðum stendur ógvuliga nógv á hjá nógvum feløgum, sum reiða út skip ella reka fiskavirki. Tað er at vóna, at nú vinnuliga umhvørvið er lagt fast fyri fiskivinnuna í eina tíð, verður møguligt at fáa viðurskiftini hjá fiskivinnuni mótvegis fíggjarstovnum lagt í fastari karmar, og við eini ávísari sanering av skuld at fáa meira fast undir føti.

Tað kann vera løgið at samanbera tað dapurskygni, sum mong hava til fiskivinnuna, við tað ovurhonds bjartskygni, sum litar øll altjóðatíðarrit um fiskivinnu. Í hesum bløðum verður bara víst á, hvussu góð vøra fiskurin er. Heilsugóð, møguleikar fyri hávirðis lidnum vørum o.s.fr. Meira tykist at verða etið av fiski um allan heim, enn vinnan megnar at framleiða. Samanumtikið er altjóðapressan samd um, at fiskur til matna er ein tryggur vinnari millum føðivørur, serliga tá trygd kann veitast fyri, at fiskurin er úr reinum umhvørvi. Hesum viðvíkjandi hava vit frá BIOFAR-kanningunum fingið váttan um, at leiðirnar undir Føroyum eru fyrsta floks.

Vaktar- og Bjargingartænastan hevur enn ikki yvirtikið fullu

ábyrgdini av fiskivinnueftirlitinum og bjarging undir Føroyum. Samráðingarnar við danskar myndugleikar drógu út; men nú verður farið undir at fáa tann samstarvssáttmála millum V & B og Færøernes Kommando til vega, sum løgtingið kravdi, áðrenn løgtingslógin frá 1989 verður sett í verk í fullum líki.

Ágangurin móti føroyska grindarakstrinum hevur verið nakað hin sami í ár sum í fjør. Landsstýrið hevur sum fyrr roynt eftir førimuni at víst aftur miskiljingum um føroyska grindadrápið.

Landsstýrið hevur verið umboðað á fundum og stevnum um hetta evni. Í apríl 1990 gjørdi landsstýrið samstarvssáttmála við Grønland, Ísland og Noreg um samstarv innan umsiting og gagnnýtan av súgdjorunum í havinum. Væntandi verður skundað umdir hetta samstarvið í komandi tíð.

Við drúgvum arbeiði eydnaðist tað at samansjóða sjónarmiðini hjá Danmark, Føroyum og Grønlandi undan 42. ársfundinum hjá Altjóða Hvalaveiðinevndini IWC, á ein hátt, sum landsstýrið kundi góðtaka. Hóast hetta varð ársfundurin hjá IWC eitt stórt vónbrot. Grindahvalurin var ikki nógv havdur á lofti, men fundurin vísti greitt, at ein stórur meiriluti í IWC av øllum alvi, sama hvørji amboðini vóru, fór at seta seg ímóti, at bannið móti gangnýtan av stórhvali verður avtikið. Somuleiðis hava teir sett sær fyri at fáa sama rætt at taka avgerðir um smáhval, t.d. grindahval.

Landsstýrið hevur tí saman við grønlendska landsstýrinum sett sær fyri at kanna, hvussu sleppast kann burtur úr IWC, tí hesin felagsskapur hevur fullkomiliga broytt innihald og er vorðin ein friðingarfelagskapur í staðin fyri ein felagsskapur, sum umsitur hvalaveiði.

Veiðimøguleikar

Sum kunnugt vóru fiskivinnusamráðingarnar fyri árið 1989 sera truplar. Tær gjørdust ikki lættari í 1990, serliga tá hugsað verður um rættindi í sovjetskum og norskum sjógvi og á NAFO-økinum. Á øðrum leiðum var støðan lítið og einki broytt í 1990 sammett við 1989.

Vert er at nevna, at Føroyar fingu somu botnfiskakvotu frá íslendingum, hóast íslendingar minkaðu um kvoturnar fyri síni egnu skip.

Í Barentshavinum minkaðu toska- og hýsukvoturnar aftur munandi bæði í norskum og sovjetskum sjógvi. Hetta merkti, at verksmiðju- og saltfiskaskipini ikki fingu fullan túr í norskum sjógvi og bert ein túr í sovjetskum sjógvi, har sovjetskir myndugleikar steðgaðu føroyskum skipum 11. juli. Landsstýrið hevur tikið støðuna hjá hesum skipum, sum liggja at kalla við ónýtiligum veiðimøguleikum restina av árinum, upp við sovjetskar myndugleikar.

Landsstýrið hevur á sama hátt tikið upp støðuna hjá skeljatrolingini á sovjetskum sjóøki upp við sovjetskar myndugleikar; men her hevur tað víst seg sera trupult at fáa nøktandi sømdir. Støðið í sáttmálanum við Sovjet er væl lægri í 1990 enn árini undan, tí Sovjet ikki hevur verið ført fyri at bjóða føroyskum myndugleikum so nógv.

Í sáttmálanum við Noreg varð støðið hildið m.a. við at geva føroyskum nótaskipum betri møguleikar at veiða makrelkvotuna og økja upsakvotuna sunnan fyri 62 breiddarstig.

Viðvíkjandi fiskiskapinum í NAFO-økinum á Flemish Cap hevði landsstýrið sett sær fyri at fáa bannið móti beinleiðis toskaveiðu á Flemish Cap burtur í 1990. Ikki var møguligt at fáa meiriluta fyri hesum á 11. ársfundi hjá NAFO í september 1989. Í staðin nýtti landsstýrið ein møguleika í NAFO reglu-

num fyri royndarfiskiskap til at fáa ein línubát í fiskivinnu.

Landsstýrið hevur somuleiðis sett sínar egnu kanningar í verk um støðuna hjá stovninum á Flemish Cap og hevur eisini við Tjaldrinum kannað, hvussu veiðibannið verður hildið á Flemish Cap. Hetta arbeiðið saman við upplýsingum frá royndarfiskiskapinum, hevur sannført landsstýrið um, at tær upplýsingar, sum lagdar hava verið fyri NAFO í 1988 og 1989 um, at bannið fyri toskaveiði hevur havt týdning fyri toskastovnin, ikki eru beinar.

Landsstýrið hevur ikki tikið støðu til, hvat ið er at gera á 12. ársfundi í NAFO, men øll kanningarúrslit okkara á Flemish Cap eru send NAFO.

Landsstýrið hevur havt umfatandi samband við canadiskar myndugleikar, men eingir møguleikar vóru fyri at varðveita tey rættindi í 1990, sum fleiri føroysk rækjuskip hava havt í canadiskum sjógvi í nøkur ár. Hetta hevur økt um kravið eftir kvotum í Eysturgrønlandi. Kvotan í Eysturgrønlandi øktist í 1990, tí tons vórðu flutt úr Vestur- til Eysturgrønlands.

Annars hevur landstýrið havt trupuleikarnar hjá teimum pørtunum av fiskiflotanum, sum hava tíðarbundnar trupulleikar á fjarleiðum, til viðgerðar. Eisini er stuðul veittur til at finna møguleikar fyri føroysk fiskifør á fjarleiðum, eitt nú við New Zealandi.

## Sjóvinna

Við gildi frá ávikavist 1. juni og 1. juli 1989 setti landsstýrið løgtingslógirnar um sjóvinnu og um at manna skip í gildi. Samstundis er fyrivarni viðvíkjandi Føroyum hjá IMO um STCW-sáttmálan um útbúgving, um sjóvinnu og um vaktarhald á skipum sett úr gildi.

Í kjalarvørrinum av nevndu lógum eru fleiri kunngerðir lýstar at galda um siglingarkrøv, tá ið sjóvinnubrøv verða útgivin, um sjóvinnubrøv og serlig útbúgvingarkrøv eftir STCW-sáttmálanum og reglur um sjón- og hoyrnarroynd fyri siglandi.

Sjóvinnuráðið er skipað og arbeiðir eftir reglugerð frá landsstýrinum. Sjóvinnufyrisiting landsstýrisins hevur ásett nýggj manningarskjøl fyri øll skip yvir 20 tons og umsitur øll mál undir nevndu lógum.

Sjómanslógin frá 1988 er ikki sett í gildi. Sostatt er sjómanslógin frá 1967 enn galdandi. Hetta kemst av, at um lógin kemur í gildi, skulu fleiri kunngerðir og reglugerðir fyrireikast um heilsutænastu fyri sjófólk, avfaringarreglur, heimferðareglur v.m.

Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu, umsitur øll sjóvinnumál, men í løtuni arbeiðir landsstýrið við at gera nærri samstarvsavtalu við Søfartsstyrelsen. Hetta er á økjum, sum eru sermál, har skipaeftirlitið røkir uppgávur fyri landsstýrið og felagsmál, sum viðvíkja føroyskum skipum og krevja ávísa viðgerð í Føroyum.

Eitt mál, sum serliga hevur fíggjarligan týdning fyri farmaflotan er tí ójøvnu kapping skip okkara eru fyri mótvegis øðrum norðurlendskum farmaskipum, tí hesi eru undir t.d. D.I.S. og N.I.S. skráseting, og tí nógv bíligari at reka.

Eftir at hava fingið nøktandi tilfar um hesi viðurskifti hevur landsstýrið í longri tíð umhugsað einhvørja loysn á hesum máli, og er ætlanin at taka støðu heilt skjótt til, hvørja skipan vit fara at velja.

## 6. Alivinnan

Alivinnan hevur trupulleikar av ymiskum slag at dragast við. Serliga er tað tann lægri prísurin, sum nú fæst fyri framleiðsluna. Eisini er tað lúsaplágan, sum hevur herjað laksin, har brúkini hava ligið tættast.

Nøkur brúk eru farin av knóranum og fleiri fara. Lagt varð upp til fíggingarhjálp, sum ikki varð givin. Óivað hevur hetta við sær, at uppaftur fleiri fara sama veg. Nøkur koma á aðrar hendur, og onnur verða kanska niðurløgd.

Vónandi minkar framleiðslan ikki ov nógv. Hetta er ein vinna, sum avgjørt kann betra livilíkindini her á landi, so vónandi fótar hon sær aftur. Loyvistíðin er longd fyri brúk á sjónum úr 7 upp í 12 ár, og fyri brúk á landi er tíðin longd úr 10 upp í 18 ár. Hetta fer at bøta um fíggingarmøguleikarnar. Eisini er alilógin broytt soleiðis, at samarbeiði og samanlegging eru liðiligari at fremja. Hetta fer sum fráliður at geva betri fíggjarligt úrslit.

## 7. Ídnaður

### Fiskavirki

Úrslitið hjá flestu flakavirkjunum var vanaligt í fjør, eins og árið fyri. Útlitini eru heldur frægari í ár, tí útflutningsprísirnir eru nakað hægri, men framvegis er ov lítil av rávøru til øll virkini.

Fiskivinnulógirnar, ið nú eru samtyktar, fara væntandi at bøta um fiskivinnuna sum heild, bæði á sjógvi og landi, serliga tá ið hugsað verður um at fáa kapping um prís og dygd.

Við rávørubýtinum verður roynt at fyribyrgja, at allur fiskurin, sum kemur upp á land, bert verður landaður á fáum

støðum. Fleiri skip verða óivað upphøgd, og tí kann roknast við, at ringt verður hjá nøkrum av virkjunum at útvega sær rávøru. Vónandi verður ein kapping millum virkini, hóast rávøran verður býtt. Tey missa rættin til fiskin, um tey ikki royna at útvega sær hann.

Ískoytið til fiskavirkini fyri at framleiða vørur, virkaðar til hægri stig enn t.d. vanligan blokk, fer at virka soleiðis, at tað verður lættari at halda ein marknað, sum vanliga gevur meir fyri meiri virkaðar vørur.

Framkomin lond keypa sær rávøru til at virka viðari til kundar, sum skulu nýta ta virkaðu vøruna. Tað eiga vit eisini at royna. Nýggja fiskivinnulógin stuðlar hesum soleiðis, at tað verður lættari at útvega sær fisk til at arbeiða í Føroyum, sum er veiddur aðrastaðni í heiminum.

<u>Ídnaður annars og handverk</u>

Roynt hevur verið at stuðla ídnaðinum sum heild - rávørugjøld o.t. til ídnaðin eru avtikin. Um sáttmáli fæst við EF, koma vit í ta støðu, at vit kunnu ikki seta avgjøld o.a., sum okkum tykir best. Tí mugu vit royna at taka alt tað burtur, sum tyngir raksturin hjá ídnaðarfyritøkum. Tí, tá ið vit hugsa um at kappast við onnur, hava vit útreiðslur, sum eru ivaleysa høgar kortini. Eisini olju- og elorkuprísin eiga vit at hava so biligan sum til ber.

Við nýggjari lóg um at byggja farmaskip hava føroyskar skipasmiðjur møguleika at kappast við útlendskar skipasmiðjur, og kann hetta útvega arbeiðspláss.

Á sama hátt sum fiski- og alivinnan og samfelagið yvirhøvur verður at laga seg eftir broyttum umstøðum við sera tvørrandi inntøkum, kapitali og tilfeingi, má føroyskur ídnaður eisini laga seg eftir nýggju umstøðunum.

Føroyskur idnaður er tó betur fyri enn vinnulívið annars. Bert partar av honum hava fingið studning, sum samfelagið annars hevur verið so nógv merkt av.

Men føroyskur idnaður gongur sum heild ímóti betri tíðum. Toll- og avgjaldsskipanin verður ikki verri ella truplari fyri hann, enn fyri lidnar útlendskar vørur. (Komandi momsskipanin tryggjar honum hetta.)

Ídnaður og handverk fara í framtíðini at umskipa sín leiðslubygnað og tillaga seg møguleikunum í europeisku marknaðarskipanini.

At ídnaðurin framvegis fer at hava tað trupult, sjálvt við frammanfyrinevndu glottum, eigur tó eingin at ivast í. Eftirspurningurin her heima er fallandi og kappingin harðnað. Tað hevur altíð verið trupult hjá okkum at duga at selt og at lagað okkum eftir marknaðarkrøvunum.

Hetta verður ikki broytt frá degi til dags; men um vit geva okkum meir far um kappingarførið, veksur sjálvsálitið og realistisk eginvirðing. Hetta eru týðandi partar í virknum søluarbeiði.

Tó haldi eg, at tað almenna má stuðla menningini av okkara søluliðum.

## 8. Landbúnaður

Mjólkarvirkið er komið við øðrum úrdráttum úr mjólk, soleiðis at mjólkin kann brúkast betur. Av tí sama verða færri tilíkar vørur innfluttar. Arbeitt verður eisini við ætlanum um at byggja eitt kjøthús, og hildið verður, at tað kann hava stóran týdning fyri landbúnaðin eins og Mjólkavirkið hevur havt.

Nýggja jarðarráðið verður nú skipað við 5 limum og kann fara

til verka sambært nýggju jarðarlógini.

Landsstýrið fer at gera eina kunngerð um landbúnaðarráð við umboðum frá vinnuni, sum skal viðgera mál landbúnaðinum viðvíkjandi og ráðgeva landsstýrinum á hesum øki.

Landsstýrið umhugsar í fíggjarlógarviðgerðini at broyta javnvágina í studningsveitanini soleiðis, at meiri stuðul verður veittur arbeiðið, sum er virkað úr føroyskum fóðri.

Ætlanin er eisini at stuðla Skógrøkt Landsins, so hon betur kann fáa tær viðalundirnar í stand aftur, sum fóru so illa í storminum næstsíðsta vetur. Eisini er áhugin vaksandi hjá einstøkum og kommunum at planta vøkstir av ymiskum slagi, og umhugsað verður at geva eina betri tænastu hesum viðvíkjandi.

## 9. Skatta- og tollmál

Nakrar broytingar eru gjørdar í skatta- og tolllóggávuni seinasta árið. Mest hevur hetta verið justeringar, meðan tað enn verður arbeitt við teim størru broytingunum, sum hava týdning fyri búskapargongdina og fíggjarumstøðurnar hjá einstøku borgarunum.

Núverandi progressivi skattastigin og kumulativa uppkrevjingarskipanin eru ikki heppin, hvørki fyri landskassan ella skattaborgaran. Harafturat eru trupulleikar og skeivleikar viðvíkjandi skatting og frádráttum av rentum. Arbeitt verður ti við at broyta skattalógina, og eiga hesar broytingar at snúgva seg um hesi øki:

a. Lagt verður um til bruttoskattaskipan, t.v.s. at rentufrádrátturin verður so líðandi umlagdur til hækkandi skattafrí botnmark.

b. Skattatrýstið verður eins frá botnmarkinum og langt upp

á inntøkustigan. Samlaða marginalskattaprosentið eigur ongantið at fara upp um 50.

Hetta ber eina týðandi skattalækking í sær og hevur tí sum fyritreyt, at lønarlagið eisini lækkar. Hendan umskipan eigur í samráð við fakfeløgini at vera liðug innan árslok 1990, tí hetta hevur samstundis alstóran týdning fyri framleiðsluvirksemið, kappingarførið, og harvið nóg nógvum arbeiði til allar hendur.

Omanfyri nevndu broytingar fara eisini at hava við sær, at lagaliga skattingin av rentuinntøkum kann halda fram uttan møguleika fyri "rentuspekulatión".

Viðvíkjandi partafeløgum verður arbeitt við uppskoti um, at rentuinntøkur og rentuútreiðslur verða mótroknaðar, áðrenn skatting fer fram.

Tollendurgjald til føroysk ídnaðarvirki fer at halda uppat um eitt ella tvey ár.

Hinvegin hevur landsstýrið sett ein arbeiðsbólk at arbeiða við týðandi broytingum av lóggávuni um toll- og innflutningsgjøld. Hetta hevur sjálvandi samband við EF-samráðingarnar og møguliga nýggja avtalu við hendan felagsskap. Men undir øllum umstøðum skulu vit rokna við, at høvuðsparturin av landskassans inntøkugjøldum verður broyttur til meirvirðisgjald, eisini rópt momsur. Roknast kann við uppskoti um slíka skipan um eitt ár.

**10. Skúlamál**

Inntøkur landskassans eru minkandi, tí er neyðugt at vísa stórt sparsemi á útreiðslusíðuni. Skúlaøkið, eins og øll onnur øki, má taka sín part av nevndu sparing. Tó eiga vit at leggja so til rættis, at tað ikki rakar ov meint. Landsstýrið arbeiðir við nýggjari ætlan, ið hevur sum setning at

spara mest møguligt, uttan at hetta nervar virksemið stórvegis.

Ætlanin verður liðug innan stutta tíð, og verður hon viðgjørd saman við fíggjarlógaruppskotinum 1991, ið landsstýrið hevur til viðgerðar.

Rættiliga nógv er hent á skúlaøkinum tey seinastu árini. Útbúgvingin fyri tey 16 til 19 ára gomlu hevur verið nógv umrødd, og ætlanin er at gera ávísar broytingar innan nevndu útbúgving. Fyri stuttum kom álit, ið mælir til at broyta bygnaðin av HF og studentaskúlanum, so at hesin skúli kann gerast meira tíðarhóskandi.

Landsstýrið hevur ætlanir um at gera nýtt lógaruppskot, grundað á viðgerð av nevnda áliti, soleiðis, at nýggja lógin helst fer at virka í skúlaárinum 1991/92.

Álit, ið viðger lærugreinina føroyskt í HF og studentaskúlanum, er somuleiðis lagt fram - og verður tikið til viðgerðar av landsskúlaráðnum og landsstýrinum í næstu framtíð.

Umstøðurnar hjá vinnuskúlunum eru og verða bøttar. Nevnast skal, at í Klaksvík er Tekniski skúlin útbygdur, og eru umstøður skúlans munandi betri nú, enn tær hava verið.

Nýggj lóg um maskinskúlaútbúgving er løgd fram av landsstýrinum til tingsins viðgerð.

Samgongan hevur sett sær sum mál at byggja nýggjan maskinskúla. Hetta arbeiði fer í gongd 1. januar 1991. Landsstýrið hevur samráðst við núsitandi stýri fyri maskinskúlan um ætlaðu broytingarnar fyri stýrisskipan skúlans. Stýrið fyri skúlan og landsstýrið hava viðgjørt upplegg um at gera eitt útbúgvingarráð fyri skúlan, sum avloysir núsitandi stýri. Semja er ímillum partarnar um, hvussu hesar reglur

skulu siggja út.

Byggingin av studenta- og HF skúlanum í Eysturoy verður framd, soleiðis sum samgongan setti sær fyri. Væl gongur við arbeiðnum, og alt bendir á, at skúlin gerst helst biligari at byggja, enn frammanundan mett.

**Sernámsfrøðiliga ráðgevingin**

Ein av uppgávunum, landsstýrissamgongan setti sær fyri, var at leggja soleiðis til rættis, at Skúlin á Trøðni í framtíðini gjørdist ein tænastustovnur hjá fólkaskúlanum. Nevndarálitið er gjørt, og kunngerðin um frálæru á hesum øki er samtykt av landsstýrinum og kunngjørd.

Landsstýrið hevur álagt landsskúlafyrisitingini at fara undir at leggja komandi skúlaár beinanvegin til rættis.

Uppskot landsstýrisins um at keypa miðhæddina frá "Grunnunum" til Landsmiðstøðina fyri undirvisingaramboð, Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna hevur løgtingið endaliga samtykt. Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at innrætta tann partin, ið ætlaður varð Skúlabókagrunninum at húsast í.

Somuleiðis verður arbeitt við at leggja tað soleiðis til rættis, at eitt størri samstarv verður millum Landsmiðstøðina fyri undirvisingartilfar, Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna, ið kann bera í sær, at meira fæst burtur úr ti peningi, ið er avsettur á fíggjarlógini til útgávu av føroyskum frálærutilfari.

Áhugin millum manna, at geva út føroyskt frálærutilfar, er stórur. Hetta er galdandi bæði innan fólkaskúlan og teir hægru skúlarnar. Serliga stórur er tørvurin á tilfari innan hægru skúlarnar.

## 11. Mentanarmál

Hóast skerjingar á fíggjarlógini, so fara áhugaverdar og spennandi hendingar fram á mentanarøkinum, ið føroyingar kunnu fegnast um.

Føroyingar eiga ikki nógv virðismikil gomul skjøl, men í ár gerast vit ríkari. Í august mánaða í ár fáa føroyingar vitjan av svenskum ríkisdagslimum og svenska mentamálaráðharranum, ið við sær hava Seyðabrævið, ið teir ætla at handa føroyingum.

Danir og norðmenn samráðast í løtuni um at lata gomul skjøl, ið eru frá samríkistíðini undan 1814, sum danir eiga, og sum eru á goymslu í Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn, í varðveitslu hjá norska ríkisskjalasavninum.

Meginparturin av hesum skjølum hevur á einhvønn hátt samband við Noreg. Ein partur av skjølunum hevur tó við Føroyar og føroysk viðurskifti at gera. Hesi skjøl hava vísindarligan og mentanarligan týdning fyri føroyingar.

Landsstýrið hevur tí vent sær til danskar myndugleikar, um at bera so í bandi, at skjøl, ið hava føroyskan áhuga, verða latin føroyingum. Danir hava sýnt føroysku sjónarmiðunum vælvild, og avtala er gjørd um, hvussu spurningurin kann verða loystur, so at áhugamál føroyinga kunnu verða gingin á møti.

Landsstýrið hevur somuleiðis borið hetta uppá mál við norska sendiharran í Danmark, nú hann vitjaði Føroyar í summar.

Nakrir stovnar á mentanarøkinum hava vánaligar arbeiðsumstøður sum er. Orsøkin er ofta, at ongar ætlanir eru ella hølini ov vánalig. Ávís útbygging á hesum øki - t.d. víðkan av listaskálanum - eigur tí helst at verða framd.

Løgtingið hevur samtykt, at navnalóggávan verður yvirtikin. Landsstýrið hevur boðað donsku myndugleikunum frá, at yvirtøkan verður framd 1. januar 1991. Til ta tíð, skulu vit hava gjørt ta nýggju lógina. Víðkað nevnd er sett at viðgera tað uppskot, ið nevndin, ið sat frammanundan hesari, legði úr hondum.

Landsstýrið arbeiðir við at skapa nýggjar lógir fyri Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya. Nevndin, ið landsstýrið hevur sett, er komin væl áleiðis við sínum arbeiði - og væntar at leggja álitið fyri landsstýrið í heyst, sum síðani leggur tað í lógarsniði til tingsins viðgerð.

**Føroyar egið biskupsdømi**

Samráðingar hava verið við donsku ríkismyndugleikarnar um at skipa soleiðis fyri, at føroyingar í framtíðini fáa sítt egna biskupsdømi.

Arbeitt verður í løtuni við sjálvum lógaruppskotinum, ið skal leggjast fyri tingið, samstundis sum tað skal viðgerast og avgreiðast av danska fólkatinginum.

Nýggjur varabiskupur verður nú valdur, men avgjørt er, at tann, ið valdur verður, gerst biskupur, tá ið lógin um egið biskupsdømi er avgreidd. Ætlanin er, at hetta skal verða gjørt innan 1. januar 1991.

**12. Orkumál**

Landsstýrið hevur veitt fíggingarmøguleikar úr Oljugrunninum til útbyggingina av fjarhitaskipan í Suðurstreymoy, sum skal nýta spillhita hjá Sundsverkinum og Brennistøðini á Hjalla.

Orkuráðið arbeiðir við ymiskum kanningum m.a. viðvíkjandi vindorku, streymorku í Vestmannasundi og orkusparing. Landsstýrið fer at viðgera hesi mál, so hvørt úrslit fyriliggja.

## 13. Ferðamannavinna

Nýggj lóg um ferðamannavinnu er samtykt í farnu tingsetu. Tíverri varð lóggávan samtykt so mikið seint, at hon fær ikki ta stóru ávirkan í ár. Nýggja Ferðamannaráðið, sum sambært lógini skal veljast, er ikki valt enn, men verður hetta avgreitt í næstum.

## 14. Almannamál

Landsstýrið hevur sett nevnd at endurskoða alla føroysku almannalóggávuna, og er nevndin farin undir arbeiði sítt.

Skattareglurnar fyri fólka- og avlamispensionistar verða broyttar við gildi frá 1. januar 1991. Eftir nýggju reglunum verður pensiónsgrundupphæddin skattafrí.

Skipanin viðvíkjandi barnastyrki er broytt soleiðis, at frádráttur verður veittur í skattinum fyri øll børn upp til 16 ár, og ein upphædd verður goldin fyri børn undir 7 ár, sum ikki eru á barnaansingarstovni.

Raksturin av stovnum undir almannaverkinum fer at verða gjølla kannaður, og fólk verður sett til hetta endamál. Ætlanin við hesum er at fáa eina betri tænastuveiting, har fíggjarligar sparingar eisini kunnu gerast.

Landsstýrið hevur sett nevnd at endurskoða og nýskipa útbyggingar av røktarheimum og eldraforsorgini. Serliga er hetta gjørt við atliti til útbyggingina í Norðstreymi, tó eisini fyri framtíðarætlanirnar sum heild. Nevndin er við at verða liðug við arbeiði sitt og verður álitið handað landsstýrinum um stutta tíð.

Røktarheimsbyggingin í Sandoynni, sum samtykt varð eftir

gomlu skipanini, er farin i gongd og verður væntandi liðug um trý ár.

Farið verður skjótt undir dagheim á Berjabrekku til Andveikraverndina.

Nevndin, sum landsstýrið setti í 1986 at kanna møguleikarnar at flyta ein part av almannaverkinum til kommunurnar, er liðug við arbeiði sitt og hevur handað landsstýrinum álit. Landsstýrið arbeiðir nú viðari við møguleikunum.

Landsstýrið setti í 1989 eina nevnd at gera álit um flutningsskipan fyri brekað. Nevndin hevur handað álitið og landsstýrið fer í næstu framtíð at taka støðu í málinum.

Arbeiðsbólkur hevur endurskoðað útbúgvingarviðurskiftini hjá heimahjálparunum. Hetta arbeiðið er nú liðugt og útbúgvingin verður í framtíðini eftir nýggju skipanini.

Lønarviðurskiftini hjá heimahjálparunum, sum í longri tíð hava verið ógreið og til viðgerðar í samráðingum imillum landsstýrið og Heimahjálparafelagið/Føroya Arbeiðarafelag, eru nú greidd.

Nýggjur sáttmáli kemur í gildi í september 1990.

## 15. Heilsumál

Tað hevur verið svárt fyri heilsuverkið at skula spara eini 15% í rakstrinum afturímóti í fjør. Tó sær út til, at hetta fer at eydnast. Sjúklingarnir hava ikki liðið stórvegis undir tí, og eigur starvsfólkið tøkk fyri, at so er.

Nýggja ambulatoriið er tikið í nýtslu, og sær tað út til at fara at virka væl. Tað verða eisini munandi færri seingjardagar á sjúkrahúsinum.

Arbeitt hevur verið við at rationalisera og broyta arbeiðsgongd o.a. soleiðis, at sum minst av tíð og arbeiðsmegi fer til spillis. Hetta hevur partvíst eydnast, men hildið verður fram við at arbeiða við hesum, soleiðis at vit kunnu hava eitt so gott heilsuverk sum til ber fyri so rímuligar upphæddir sum gjørligt.

Sjúkrahúsverkið

Sjúkrahúsverkið var tað øki av teimum stóru, sum álagt varð at spara mest. Alt bendir á, at sjúkrahúsverkið fer at halda fíggjarætlanina.

Tá ið havt verður í huga, at sjúkrahúsverkið er eitt tað viðkvæmasta økið, har tað sostatt er eina ringast at spara, so má sigast, at sjúkrahúsverkið er besta dømið um, at sparipolitikkur landsstýrisins er gjørligur.

Tað er ikki ætlan landsstýrisins at spara enn meiri innan sjúkrahúsverkið. Men arbeiðið við at rationalisera og effektivisera innan hetta økið heldur fram. Tá ið so nógv verður spart, er neyðugt, at støðugt eftirlit er við tí lækkaðu fíggingini, so at tað verður nýtt til frama fyri sjúklingarnar.

Landsstýrið hevur tí gjørt eina arbeiðsætlan fyri at tryggja ein rakstur, sum ber seg. Fyritreytin fyri arbeiðsætlanini er, at samlaða diagnostiska og viðgerðarliga orkan í sjúkrahúsverkinum er ein eind.

Í hesi arbeiðsætlan er sett á stovn ein visitatiónsnevnd innan heilíráð og ein innan skurðviðgerð. Í hvørji visitatiónsnevnd er ein lækni frá hvørjum sjúkrahúsi, ein kommunulækni og ein limur frá sjúkrahússtjóranum. Visitatiónsnevndin hevur sum setning at finna ein skilagóðan hátt at býta sjúklingarnar millum sjúkrahúsini, eisini Ríkishospitalið, at gera avtalur um ráðgevaraskipanir, at samskipa

tólinnkeyp og at meta um nýggjar viðgerðarætlanir. Visitatiónsnevndirnar eru so smátt farnar til verka.

Arbeiðsætlan landsstýrisins setur sum treyt, at í framtíðar ráðlegging um útbyggingar av sjúkrahúsverkinum verður Landssjúkrahúsið centralsjúkrahúsið, sum skal mennast sum slíkt, og taka sær av sergreindum uppgávum. Hini sjúkrahúsini eru blandað sjúkrahús, sum taka sær av akuttum sjúklingum frá heimliga økinum.

Lagt skal verða afturat, at virksemið hjá teim báðum smærru sjúkrahúsunum verður ikki minkað.

Landsstýrið hevur eisini ætlan um, fyri at minka um seingjardagarnar, at menna tað ambulanta virksemið. Til ambulant virksemi eru fleiri serlæknar neyðugir, enn teir vit hava í dag. Hesir kunnu útvegast og tó ikki kosta meir, um vit umskipa øll núverandi 1. hjálparlæknastørv til yvirlæknastørv.

Tær núverandi sjúkrahúsbyggiætlanirnar hava sín uppruna í einum ráðleggingararbeiði, ið var gjørt fyrst í 80'unum. Tá ið fortreytirnar í dag ikki eru tær somu, fer landsstýrið at steðga bygginini fyribils, soleiðis at møguleiki verður at endurskoða allar ætlanir um sjúkrahúsbygging.

**16. Arbeiðsmarknaðarmál**

Við tí búskaparligu støðu, samfelagið er komið í, er tað ikki so løgið, at samskiftið hevur verið nógv millum landsstýrið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Samgongan setti sær fyri at avtaka lóggávuna um at prístalsviðgera lønir. Hetta varð galdandi frá 1. apríl 1990.

Lóg um vinnusteðg er eisini samtykt.

Lógaruppskot er somuleiðis gjørt um at seta arbeiðsrætt á stovn. Í semjuni, sum gjørd varð millum løgmann og umboð fyri fakfeløg hin 25. april 1990, fingu partarnir á arbeiðsmarknaðinum freist til ávikavist 1. september 1990 og 1. mai 1991 at vera lidnir við avtalaða skipan um víðkaðan gerðarrætt/arbeiðsrætt, sum skal hava tilknýti til sáttmálarnar. Landsstýrið bíðar sostatt eftir hesum arbeiði, og kemur ikki við nøkrum uppskoti, meðan samráðingarnar fara fram.

Í somu semju frá 25. april 1990 var eisini avtalað, at ein arbeiðsbólkur skuldi verða settur at gera uppskot til skipaða útbúgving av arbeiðsfólki.

Við kunngerð hevur landsstýrið sett eitt arbeiðsmarknaðarráð, sum kann taka øll mál til viðgerðar, sum hava við støðuna á arbeiðsmarknaðinum at gera. Ráðið skal í minsta lagi hava ein fund hvønn ársfjórðing at viðgera gongdina á arbeiðsmarknaðinum.

Landsstýrið hevur valt formann fyri ráðið og feløgini hava annars fingið áheitan um at tilnevna sínar limir.

Arbeitt verður við at gera nýggja yrkisútbúgvingarlóg og er nevnd sett at gera uppskot til broytingar í núverandi lærlingalóg. Ætlanin er at leggja lógaruppskotið fyri tingið í hesi tingsetu.

Lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er útsett til 1. januar 1991. Sambært avtalu í samgonguskjalinum verður búskaparliga ávirkanin av hesi skipan kannað og møguleikarnir fyri øðrum pensiónsskipanum lýstir.

Størsta vandamál við minkandi virkseminum, sum gjørdist ein fylgja av tí ov stóra virkseminum frammanundan, er arbeiðsloysi. Hóast búskaparligu tálmingina hava vit enn ikki havt tað stóra arbeiðsloysið, men nakað hevur víst seg at verið serliga um vetrarhálvárið. Nøkur nágreinilig uppgerð finnst

ikki og nøkur skipað arbeiðsávísing er heldur ikki.

Í áður nevndu fundarfrágreiðing frá 25. april 1990 vóru eisini arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging umrødd, og er ætlanin at partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera kanningar av hesum viðurskiftum.

Landsstýrisins politikkur er annars at minka um arbeiðsloysi við at skapa umstøður fyri øktum arbeiðsmøguleikum. Í hesum viðfangi er vert at nevna tað nevndararbeiðið, sum gjørt er til tess at kanna møguleikan fyri at lækka lønir og skatt til frama fyri framleiðsluna í samfelagnum. Hetta verður gjøllari umrøtt undir skattamálum.

**17. Íbúðamál**

Minkandi virksemið í landinum hevur havt við sær, at húsa- og grundstykkjaprísir eru farnir niður, og at heldur minni verður bygt.

Landsstýrið hevur givið Húsalánsgrunninum loyvi til at taka lán og harvið økja um sitt fíggingarføri. Lánstreytirnar hjá grunninum eru eisini broyttar. Møguleikar verða helst skjótt fyri, at vanlig sethúsafígging verður nøktað av lánum frá Sparikassa og Húsalánsgrunninum.

**18. Kommunumál**

Tað minkandi virksemið hevur eisini havt sína ávirkan á kommunurnar. Tær hava færri arbeiði í gongd; men eru annars við í samlaðu íløguætlanini uppá 550 mió. kr. árliga.

Landsstýrið arbeiðir framhaldandi við at leggja ymisk málsøki út til kommunurnar ella samtak av kommunum. Nevnast kunnu málsøki, sum almannamál, byggi- og brunamál, umhvørvismál o.a.

Landsstýrið hevur havt samráðingar við Kommunekredit um uppafturtøku av lánveitingum til føroyskar kommunur uttan statsveðhald. Hesar samráðingar eru ikki lidnar enn.

## 19. Umhvørvismál

Arbeiðið við at gera umhvørvisverndarlógina meira tíðarhóskandi heldur fram, men tað hevur víst seg, at hetta arbeiðið er truplari enn av fyrstani tíð hildið. Kommunurnar eru við í hesum arbeiði.

Skipanin við bilvraksgrunni er um at verða sett í verk, og ætlanin er, at eftir hesi skipan kann tann, sum eigur eitt bilvrak, lata hetta til Interkommunala Renovatións Felagið ella kommunalu Orku- og Brennistøðina í Tórshavn ella fyritøkuna "Bilupphøgg" í Tórshavn. Tá hetta verður gjørt, fær eigarin kr. 1.000 í hondina og viðkomandi fyritøka kr. 500 fyri ómakin. Sum fráliður fer hetta uttan iva at bøta munandi um umhvørvið um alt landið.

Umsitingin av umhvørvisvernd er nú undir samskiftisdeildini í Tinganesi, sum annars hevur við tøknilig tiltøk at gera.

Landsstýrið hevur góðkent virksemið hjá felagnum ROY/IRF, sum er ein felagsskapur millum IRF og privatmann. Endamálið er at skapa góðar umstøður fyri at viðgera spillolju - til gagns fyri umhvørvið og helst eisini fyri orkutilfeingið í Føroyum.

Landsstýrið hevur givið nøkur loyvi sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini, og sum dømi kann nevnast loyvið hjá IRF at hava tyrvingarpláss í Oyndarfirði, og við Skarðsá í Bø.

Í fjør varð kunngerð um tjaldingarstøð (camping) sett í gildi, har ásett verður, at bert er loyvt at seta upp tjøld, har grundleggjandi treytirnar - nátthús og vaskihús - eru

til staðar.

Landsstýrið hevur gjørt eina kanning um støðuna á Sørvágsfirði við yvirliti yvir tær ymisku dálkingarkeldurnar og lutfalsliga árin teirra. Álitið er lagt fyri tingið til kunningar.

Landsstýrið heldur fast við, at umhvørvið her heima eigur at vera betri vart, enn tað er. Hetta eigur at verða gjørt hóast truplar fíggjarligar umstøður.

Landsstýrið umhugsar tí at seta á stovn umhvørvisgrunn. Grunnurin er ætlaður at veita stuðul til tiltøk, sum kunnu fremja vernd av umhvørvinum.

Landsstýrið hevur verið virkið á altjóða fundum um umhvørvismál. Serliga viðvíkjandi bretska endurvinningarverkinum í Dounreay hevur landsstýrið mótmælt bæði fyri bretsku stjórnini og teim londum, sum ætla at flyta atomburturkast til Norður-Skotlands.

**20. Samferðslumál**

Í tíðum, har almennu útreiðslurnar verða skerdar, er samferðsluøkið tað økið, sum mest kennir fylgjurnar av niðurskurðunum.

Vegarbeiðini eru i:ki so nógv, sum áður, men kortini hevur verið roynt at hava tey arbeiði, sum eru í gongd, býtt út á landsins ymisku øki.

Tunnilsarbeiðið í Suðuroynni og á Streymoynni heldur fram, hóast tað er nógv slakari enn áður. Arbeiðið fram til munnan av einum komandi Gásadalsbergholi er í gongd.

Nakrar størri havnabyggingar eru framvegis í gerð, men roknast kann ikki við, at farið verður undir fleiri nýggjar

havnabyggingar fyribils, tí kommunurnar aftra seg við at fara undir slík stórarbeiði við núverandi fíggjarumstøðum.

Bæði Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir merkja fíggjarligu skerjingarnar, men kortini kann sigast, at tænastustøðið framvegis er hampuliga gott.

Smyril er farin í nýggja samferðslurutu til Skotlands, leigaður av privatum skipafelag til farmasigling. Væntandi og vónandi eydnast hetta tiltak til frama fyri bæði føroyskan útflutning og innflutning.

Ferðamannatalið á flogrutunum millum Føroya og útheimin hevur verið minkandi seinasta árið. Kappingin millum Atlantic Airways og Danair er tí eisini harðnað.

P/f Atlantic Airways hevur fingið umfíggjað flogfarið og bøtir hetta nakað um fíggjarviðurskifti felagsins.

Sum høvuðspartaeigari fylgir landsstýrið við gongdini hjá felagnum og skal eg endurtaka, at føroyska felagið er komið fyri at vera. Hetta snýr seg jú um einasta ferðamannasamband okkara við útheimin 8 mánaðir av árinum.

**21. Undirgrundin**

Nevndin, sum samgongan setti at stíla fyri samráðingum um undirgrundina, hevur sent donsku stjórnini uppskot um eitt sindur broytt kommissorium hjá serkønu arbeiðsnevndini, sum skal halda fram í arbeiðinum og finna eina endaliga loysn.

Samgongan er sinnað at fáa greitt hetta mál skjótt. Eisini tí tað kann gerast aktuelt at geva loyvi til royndarboringar eftir ráevni í undirgrundini.

**22. Viðurskifti við EF o.a.**

Samráðingarnar við EF um ein nýggja handilsskipan eru vorðnar drúgvari enn væntað.

Í fjør heyst samdust landsstýrið og ríkisstjórnin um, at besta leiðin at ganga í hesum samráðingum var at biðja um eina fríhandilsskipan, har allar vørur, ið seldar vórðu partanna millum, vóru tollfríar, tó kanska við einstøkum undantøkum. Vit vildu undir ongum umstøðum lata fiskikvotur afturfyri tollsømdir fyri føroyskan fisk.

EF hevði ógvuliga langa tíð um at taka støðu til hetta uppskot. Ikki fyrrenn í apríl í ár tók Ráðharrastovnurin í EF undir við uppskoti frá EF-nevndini um eina samráðingarheimild, sum kortini er soleiðis orðað, at hon kann umfata bæði eina fríhandilsavtalu sum hana, vit ynskja, og eina minni viðgongda handilsskipan, ið EF tykist heldur vilja hava.

Undir vitjan í Brüssel fyrst í mai hevði løgmaður høvi at hitta politiskar talsmenn fyri EF, ið søgdu seg væl skilja føroysku ynskini, harímillum, at Føroyar ikki vildu lata sær lynda einans at selja EF rávørur. Tollfrælsið skuldi eisini umfata viðgjørdar vørur.

Síðani hava samráðingar verið á embætismannastigi, higartil í trimum umførum, og verður tað fjórða væntandi um hálvan september.

Tað er einki yvir at dylja, at støðan hjá EF-umboðunum í hesum samráðingum higartil hevur verið eitt vónbrot. Tey uppskot, EF hevur sett fram um tollfrælsi á fiskavørum eru í fleiri týðandi førum avmarkað til nøgdir, ið ikki samsvara við framtíðar tørvin hjá føroysku útflutningsvinnuni.

Kortini hava vit ikki mist alla vón um, at EF skilir tørv

okkara, skilir, at tær handilssømdir, vit bjóða afturímóti, ikki eru heilt týdningarleysar, og eisini skilir sín egna politiska tørv á eini loysn, sum ikki bert teir sjálvir, men eisini vit kunnu liva við.

Landsstýrið roknar sostatt við, at semja fæst við EF um eina fríhandilsavtalu, tá ið líður út á heystið, og at hon kann fáast at virka 1. juli 1991.

Landsstýrið er farið undir at fyrireika tær broytingar, ið gerast skulu í føroysku avgjaldsskipanini, til tess at vit kunnu halda okkara part av komandi fríhandilsavtaluni.

Tá ið samráðingarnar við EF eru loknar, er ætlanin at samráðast um fríhandilsavtalur við EFTA-londini, við tí í hyggju at geva føroyskum vørum so víðar ræsur sum gjørligt í tí umfatandi europeiska búskaparøkinum, ið samráðingarnar millum EF og EFTA miða ímóti at stovnseta.

Landsstýrið roynir eisini at fylgja við í samráðingunum millum EF og EFTA um at skapa tað europeiska búskaparøkið, EES. Enn eru hesar samráðingar komnar ógvuliga stutt. Eisini fylgja vit við í tí orðaskifti um viðurskiftini við EF, ið hevur tikið seg upp í hinum Norðurlondunum.

Umframt handilsviðurskifti hevur EF nógv annað samarbeiði. Løgtingssamtyktin um, at Føroyar vera uttanfyri EF stendur við. Men ríkisfelagsskapur okkara við limalandið Danmark ger, at støða verður at taka til ymiskar týdningarmiklar spurningar í framtíðini. Skipanin av eini politiskari EF unión, um hon verður veruleiki, setur krøv til politiskar avgerðir føroyskumegin.

Rættiliga sannlíkt er tað, at EF fer at skipa fyri eini valutaunión, t.v.s. at øll limalondini fáa sama gjaldoyrisvirði. Tá ið vit frammanundan eru í gjaldoyrissamgongu við Danmark, fara vit at vera við í eini slíkari gjaldoyrissam-

gongu. Tað fer at seta krøv til skilagóðan føroyskan búskaparpolitikk i framtiðini.

Sum heild fara vit at vera við i einum størri altjóða handilssamskifti og ikki minst aftaná, at alt Eystureuropa letur sínar marknaðir upp, eiga vit at hava eyguni opin fyri øllum sølumøguleikum og øðrum samarbeiðsmøguleikum, sum til dømis joint ventures.

Vit eiga ikki at vera ræddir fyri at kanna møguleikar fyri at seta virki á stovn i øðrum londum ella at lata aðrar seta seg niður her á landi.

Heldur ikki eiga vit at vísa altjóða fíggingarstovnum burtur i at virka i Føroyum og kanska laga lóggávu okkara til slíkt virksemi.

---

Eitt ár er nú farið síðani núverandi samgonga av Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum varð skipað.

Bæði innan- og uttanlands var stórt bilsni um, at ein slík politisk samanrenning kundi fáast i lag. Men hesir flokkar sóu ta álvarsligu støðu, land okkara var komið i, og teir tóku saman hendur við tí endamáli at endurreisa føroyska samfelagið og fyrst og fremst tað búskaparliga og vinnuliga grundarlagið.

Eingin roknaði við, at tað fór at verða lætt, og øll vistu, at tað tók sína tíð. At tað fór at merkjast og kennast í hvørjum króki i samfelagnum, bæði hjá tí einstaka, hjá familjum á bygd og i bý og á arbeiðsplássunum eru øll greið um.

Stór tøk eru tikin hetta árið. Fólkið hevur borið tungar

byrðar, minni pening um hendi, goldið tvungna uppsparing, í ávísum førum vandi fyri arbeiðsplássum, láns- og kredittmøguleikarnir hava verið verri og tyngst hevur tað kennst hjá teimum, sum settu búgv hesa seinastu tíðina, meðan grundstykkja- og húsaprísirnir vóru í hæddini orsakað av ovurvirkseminum.

Tey tyngstu búskapartiltøkini eru gjørd og tey, sum skulu fáa vinnuna aftur á føti, eru júst frá hondini. Tey, sum nú skulu fremjast, eru tey, sum aftur spakuliga skulu menna tann privata búskapin, tann hjá einstaklinginum og familjuni. Ikki við stórum studningum og almennum tænastuvirksemi, men við eini betri lønar- og skattaskipan.

Vónandi stendur politiska samgongan saman um hetta og vónandi skilir eisini andstøðan, at einki verður vunnið við opportunistiskum orðklúgvari.

Latið okkum halda fast við tað, sum vunnið er, latið okkum bøta um tað, sum ikki eydnaðist heilt, men tó er ein bati, og latið okkum halda fram við at gera tað, sum eftir er, fyri at endurreisingararbeiðið skal eydnast.

## 11. Mentanarmál

Hóast skerjingar á fíggjarlógini, so fara áhugaverdar og spennandi hendingar fram á mentanarøkinum, ið føroyingar kunnu fegnast um.

Føroyingar eiga ikki nógv virðismikil gomul skjøl, men í ár gerast vit ríkari. Í august mánaða í ár fáa føroyingar vitjan av svenskum ríkisdagslimum og svenska mentamálaráðharranum, ið við sær hava Seyðabrævið, ið teir ætla at handa føroyingum.

Danir og norðmenn samráðast í løtuni um at lata gomul skjøl, ið eru frá samríkistíðini undan 1814, sum danir eiga, og sum eru á goymslu í Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn, í varðveitslu hjá norska ríkisskjalasavninum.

Meginparturin av hesum skjølum hevur á einhvønn hátt samband við Noreg. Ein partur av skjølunum hevur tó við Føroyar og føroysk viðurskifti at gera. Hesi skjøl hava vísindarligan og mentanarligan týdning fyri føroyingar.

Landsstýrið hevur tí vent sær til danskar myndugleikar, um at bera so í bandi, at skjøl, ið hava føroyskan áhuga, verða latin føroyingum. Danir hava sýnt føroysku sjónarmiðunum vælvild, og avtala er gjørd um, hvussu spurningurin kann verða loystur, so at áhugamál føroyinga kunnu verða gingin á møti.

Landsstýrið hevur somuleiðis borið hetta uppá mál við norska sendiharran í Danmark, nú hann vitjaði Føroyar í summar.

Nakrir stovnar á mentanarøkinum hava vánaligar arbeiðsumstøður sum er. Orsøkin er ofta, at ongar ætlanir eru ella hølini ov vánalig. Ávís útbygging á hesum øki - t.d. víðkan av listaskálanum - eigur tí helst at verða framd.

Løgtingið hevur samtykt, at navnalóggávan verður yvirtikin. Landsstýrið hevur boðað donsku myndugleikunum frá, at yvirtøkan verður framd 1. januar 1991. Til ta tíð, skulu vit hava gjørt ta nýggju lógina. Víðkað nevnd er sett at viðgera tað uppskot, ið nevndin, ið sat frammanundan hesari, legði úr hondum.

Landsstýrið arbeiðir við at skapa nýggjar lógir fyri Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya. Nevndin, ið landsstýrið hevur sett, er komin væl áleiðis við sínum arbeiði - og væntar at leggja álitið fyri landsstýrið í heyst, sum síðani leggur tað í lógarsniði til tingsins viðgerð.

**Føroyar egið biskupsdømi**

Samráðingar hava verið við donsku ríkismyndugleikarnar um at skipa soleiðis fyri, at føroyingar í framtíðini fáa sitt egna biskupsdømi.

Arbeitt verður í løtuni við sjálvum lógaruppskotinum, ið skal leggjast fyri tingið, samstundis sum tað skal viðgerast og avgreiðast av danska fólkatinginum.

Nýggjur varabiskupur verður nú valdur, men avgjørt er, at tann, ið valdur verður, gerst biskupur, tá ið lógin um egið biskupsdømi er avgreidd. Ætlanin er, at hetta skal verða gjørt innan 1. januar 1991.

**12. Orkumál**

Landsstýrið hevur veitt fíggingarmøguleikar úr Oljugrunninum til útbyggingina av fjarhitaskipan í Suðurstreymoy, sum skal nýta spillhita hjá Sundsverkinum og Brennistøðini á Hjalla.

Orkuráðið arbeiðir við ymiskum kanningum m.a. viðvíkjandi vindorku, streymorku í Vestmannasundi og orkusparing. Landsstýrið fer at viðgera hesi mál, so hvørt úrslit fyriliggja.

**13. Ferðamannavinna**

Nýggj lóg um ferðamannavinnu er samtykt í farnu tingsetu. Tíverri varð lóggávan samtykt so mikið seint, at hon fær ikki ta stóru ávirkan í ár. Nýggja Ferðamannaráðið, sum sambært lógini skal veljast, er ikki valt enn, men verður hetta avgreitt í næstum.

**14. Almannamál**

Landsstýrið hevur sett nevnd at endurskoða alla føroysku almannalóggávuna, og er nevndin farin undir arbeiði sitt.

Skattareglurnar fyri fólka- og avlamispensionistar verða broyttar við gildi frá 1. januar 1991. Eftir nýggju reglunum verður pensiónsgrundupphæddin skattafrí.

Skipanin viðvíkjandi barnastyrki er broytt soleiðis, at frádráttur verður veittur í skattinum fyri øll børn upp til 16 ár, og ein upphædd verður goldin fyri børn undir 7 ár, sum ikki eru á barnaansingarstovni.

Raksturin av stovnum undir almannaverkinum fer at verða gjølla kannaður, og fólk verður sett til hetta endamál. Ætlanin við hesum er at fáa eina betri tænastuveiting, har fíggjarligar sparingar eisini kunnu gerast.

Landsstýrið hevur sett nevnd at endurskoða og nýskipa útbyggingar av røktarheimum og eldraforsorgini. Serliga er hetta gjørt við atliti til útbyggingina í Norðstreymi, tó eisini fyri framtíðarætlanirnar sum heild. Nevndin er við at verða liðug við arbeiði sitt og verður álitið handað landsstýrinum um stutta tíð.

Røktarheimsbyggingin í Sandoynni, sum samtykt varð eftir

gomlu skipanini, er farin í gongd og verður væntandi liðug um trý ár.

Farið verður skjótt undir dagheim á Berjabrekku til Andveikraverndina.

Nevndin, sum landsstýrið setti í 1986 at kanna møguleikarnar at flyta ein part av almannaverkinum til kommunurnar, er liðug við arbeiði sitt og hevur handað landsstýrinum álit. Landsstýrið arbeiðir nú viðari við møguleikunum.

Landsstýrið setti í 1989 eina nevnd at gera álit um flutningsskipan fyri brekað. Nevndin hevur handað álitið og landsstýrið fer í næstu framtíð at taka støðu í málinum.

Arbeiðsbólkur hevur endurskoðað útbúgvingarviðurskiftini hjá heimahjálparunum. Hetta arbeiðið er nú liðugt og útbúgvingin verður í framtíðini eftir nýggju skipanini.

Lønarviðurskiftini hjá heimahjálparunum, sum í longri tíð hava verið ógreið og til viðgerðar í samráðingum imillum landsstýrið og Heimahjálparafelagið/Føroya Arbeiðarafelag, eru nú greidd.

Nýggjur sáttmáli kemur í gildi í september 1990.

## 15. Heilsumál

Tað hevur verið svárt fyri heilsuverkið at skula spara eini 15% í rakstrinum afturímóti í fjør. Tó sær út til, at hetta fer at eydnast. Sjúklingarnir hava ikki liðið stórvegis undir tí, og eigur starvsfólkið tøkk fyri, at so er.

Nýggja ambulatoriið er tikið í nýtslu, og sær tað út til at fara at virka væl. Tað verða eisini munandi færri seingjardagar á sjúkrahúsinum.

Arbeitt hevur verið við at rationalisera og broyta arbeiðsgongd o.a. soleiðis, at sum minst av tíð og arbeiðsmegi fer til spillis. Hetta hevur partvíst eydnast, men hildið verður fram við at arbeiða við hesum, soleiðis at vit kunnu hava eitt so gott heilsuverk sum til ber fyri so rímuligar upphæddir sum gjørligt.

Sjúkrahúsverkið

Sjúkrahúsverkið var tað øki av teimum stóru, sum álagt varð at spara mest. Alt bendir á, at sjúkrahúsverkið fer at halda fíggjarætlanina.

Tá ið havt verður í huga, at sjúkrahúsverkið er eitt tað viðkvæmasta økið, har tað sostatt er eina ringast at spara, so má sigast, at sjúkrahúsverkið er besta dømið um, at sparipolitikkur landsstýrisins er gjørligur.

Tað er ikki ætlan landsstýrisins at spara enn meiri innan sjúkrahúsverkið. Men arbeiðið við at rationalisera og effektivisera innan hetta økið heldur fram. Tá ið so nógv verður spart, er neyðugt, at støðugt eftirlit er við ti lækkaðu fígginini, so at tað verður nýtt til frama fyri sjúklingarnar.

Landsstýrið hevur tí gjørt eina arbeiðsætlan fyri at tryggja ein rakstur, sum ber seg. Fyritreytin fyri arbeiðsætlanini er, at samlaða diagnostiska og viðgerðarliga orkan í sjúkrahúsverkinum er ein eind.

Í hesi arbeiðsætlan er sett á stovn ein visitatiónsnevnd innan heiliráð og ein innan skurðviðgerð. Í hvørji visitatiónsnevnd er ein lækni frá hvørjum sjúkrahúsi, ein kommunulækni og ein limur frá sjúkrahússtjóranum. Visitatiónsnevndin hevur sum setning at finna ein skilagóðan hátt at býta sjúklingarnar millum sjúkrahúsini, eisini Ríkishospitalið, at gera avtalur um ráðgevaraskipanir, at samskipa

tólinnkeyp og at meta um nýggjar viðgerðarætlanir. Visitatiónsnevndirnar eru so smátt farnar til verka.

Arbeiðsætlan landsstýrisins setur sum treyt, at í framtíðar ráðlegging um útbyggingar av sjúkrahúsverkinum verður Landssjúkrahúsið centralsjúkrahúsið, sum skal mennast sum slíkt, og taka sær av sergreindum uppgávum. Hini sjúkrahúsini eru blandað sjúkrahús, sum taka sær av akuttum sjúklingum frá heimliga økinum.

Lagt skal verða afturat, at virksemið hjá teim báðum smærru sjúkrahúsunum verður ikki minkað.

Landsstýrið hevur eisini ætlan um, fyri at minka um seingjardagarnar, at menna tað ambulanta virksemið. Til ambulant virksemi eru fleiri serlæknar neyðugir, enn teir vit hava í dag. Hesir kunnu útvegast og tó ikki kosta meir, um vit umskipa øll núverandi 1. hjálparlæknastørv til yvirlæknastørv.

Tær núverandi sjúkrahúsbyggiætlanirnar hava sín uppruna í einum ráðleggingararbeiði, ið var gjørt fyrst í 80'unum. Tá ið fortreytirnar í dag ikki eru tær somu, fer landsstýrið at steðga byggingini fyribils, soleiðis at møguleiki verður at endurskoða allar ætlanir um sjúkrahúsbygging.

## 16. Arbeiðsmarknaðarmál

Við tí búskaparligu støðu, samfelagið er komið í, er tað ikki so løgið, at samskiftið hevur verið nógv millum landsstýrið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Samgongan setti sær fyri at avtaka lóggávuna um at prístalsviðgera lønir. Hetta varð galdandi frá 1. apríl 1990.

Lóg um vinnusteðg er eisini samtykt.

Lógaruppskot er somuleiðis gjørt um at seta arbeiðsrætt á stovn. Í semjuni, sum gjørd varð millum løgmann og umboð fyri fakfeløg hin 25. april 1990, fingu partarnir á arbeiðsmarknaðinum freist til ávikavist 1. september 1990 og 1. mai 1991 at vera lidnir við avtalaða skipan um víðkaðan gerðarrætt/arbeiðsrætt, sum skal hava tilknýti til sáttmálarnar. Landsstýrið bíðar sostatt eftir hesum arbeiði, og kemur ikki við nøkrum uppskoti, meðan samráðingarnar fara fram.

Í somu semju frá 25. april 1990 var eisini avtalað, at ein arbeiðsbólkur skuldi verða settur at gera uppskot til skipaða útbúgving av arbeiðsfólki.

Við kunngerð hevur landsstýrið sett eitt arbeiðsmarknaðarráð, sum kann taka øll mál til viðgerðar, sum hava við støðuna á arbeiðsmarknaðinum at gera. Ráðið skal í minsta lagi hava ein fund hvønn ársfjórðing at viðgera gongdina á arbeiðsmarknaðinum.

Landsstýrið hevur valt formann fyri ráðið og feløgini hava annars fingið áheitan um at tilnevna sínar limir.

Arbeitt verður við at gera nýggja yrkisútbúgvingarlóg og er nevnd sett at gera uppskot til broytingar í núverandi lærlingalóg. Ætlanin er at leggja lógaruppskotið fyri tingið í hesi tingsetu.

Lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er útsett til 1. januar 1991. Sambært avtalu í samgonguskjalinum verður búskaparliga ávirkanin av hesi skipan kannað og møguleikarnir fyri øðrum pensiónsskipanum lýstir.

Størsta vandamál við minkandi virkseminum, sum gjørdist ein fylgja av tí ov stóra virkseminum frammanundan, er arbeiðsloysi. Hóast búskaparligu tálmingina hava vit enn ikki havt tað stóra arbeiðsloysið, men nakað hevur víst seg at verið serliga um vetrarhálvárið. Nøkur nágreinilig uppgerð finnst

ikki og nøkur skipað arbeiðsávísing er heldur ikki.

Í áður nevndu fundarfrágreiðing frá 25. april 1990 vóru eisini arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging umrødd, og er ætlanin at partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera kanningar av hesum viðurskiftum.

Landsstýrisins politikkur er annars at minka um arbeiðsloysi við at skapa umstøður fyri øktum arbeiðsmøguleikum. Í hesum viðfangi er vert at nevna tað nevndararbeiðið, sum gjørt er til tess at kanna møguleikan fyri at lækka lønir og skatt til frama fyri framleiðsluna í samfelagnum. Hetta verður gjøllari umrøtt undir skattamálum.

**17. Íbúðamál**

Minkandi virksemið í landinum hevur havt við sær, at húsa- og grundstykkjaprísir eru farnir niður, og at heldur minni verður bygt.

Landsstýrið hevur givið Húsalánsgrunninum loyvi til at taka lán og harvið økja um sitt fíggingarføri. Lánstreytirnar hjá grunninum eru eisini broyttar. Møguleikar verða helst skjótt fyri, at vanlig sethúsafígging verður nøktað av lánum frá Sparikassa og Húsalánsgrunninum.

**18. Kommunumál**

Tað minkandi virksemið hevur eisini havt sína ávirkan á kommunurnar. Tær hava færri arbeiði í gongd; men eru annars við í samlaðu íløguætlanini uppá 550 mió. kr. árliga.

Landsstýrið arbeiðir framhaldandi við at leggja ymisk málsøki út til kommunurnar ella samtak av kommunum. Nevnast kunnu málsøki, sum almannamál, byggi- og brunamál, umhvørvismál o.a.

Landsstýrið hevur havt samráðingar við Kommunekredit um uppafturtøku av lánveitingum til føroyskar kommunur uttan statsveðhald. Hesar samráðingar eru ikki lidnar enn.

## 19. Umhvørvismál

Arbeiðið við at gera umhvørvisverndarlógina meira tíðarhóskandi heldur fram, men tað hevur víst seg, at hetta arbeiðið er truplari enn av fyrstani tíð hildið. Kommunurnar eru við í hesum arbeiði.

Skipanin við bilvraksgrunni er um at verða sett í verk, og ætlanin er, at eftir hesi skipan kann tann, sum eigur eitt bilvrak, lata hetta til Interkommunala Renovatións Felagið ella kommunalu Orku- og Brennistøðina í Tórshavn ella fyritøkuna "Bilupphøgg" í Tórshavn. Tá hetta verður gjørt, fær eigarin kr. 1.000 í hondina og viðkomandi fyritøka kr. 500 fyri ómakin. Sum fráliður fer hetta uttan iva at bøta munandi um umhvørvið um alt landið.

Umsitingin av umhvørvisvernd er nú undir samskiftisdeildini í Tinganesi, sum annars hevur við tøknilig tiltøk at gera.

Landsstýrið hevur góðkent virksemið hjá felagnum ROY/IRF, sum er ein felagsskapur millum IRF og privatmann. Endamálið er at skapa góðar umstøður fyri at viðgera spillolju - til gagns fyri umhvørvið og helst eisini fyri orkutilfeingið í Føroyum.

Landsstýrið hevur givið nøkur loyvi sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini, og sum dømi kann nevnast loyvið hjá IRF at hava tyrvingarpláss í Oyndarfirði, og við Skarðsá í Bø.

Í fjør varð kunngerð um tjaldingarstøð (camping) sett í gildi, har ásett verður, at bert er loyvt at seta upp tjøld, har grundleggjandi treytirnar - nátthús og vaskihús - eru

til staðar.

Landsstýrið hevur gjørt eina kanning um støðuna á Sørvágsfirði við yvirliti yvir tær ymisku dálkingarkeldurnar og lutfalsliga árin teirra. Álitið er lagt fyri tingið til kunningar.

Landsstýrið heldur fast við, at umhvørvið her heima eigur at vera betri vart, enn tað er. Hetta eigur at verða gjørt hóast truplar fíggjarligar umstøður.

Landsstýrið umhugsar tí at seta á stovn umhvørvisgrunn. Grunnurin er ætlaður at veita stuðul til tiltøk, sum kunnu fremja vernd av umhvørvinum.

Landsstýrið hevur verið virkið á altjóða fundum um umhvørvismál. Serliga viðvíkjandi bretska endurvinningarverkinum í Dounreay hevur landsstýrið mótmælt bæði fyri bretsku stjórnini og teim londum, sum ætla at flyta atomburturkast til Norður-Skotlands.

**20. Samferðslumál**

Í tíðum, har almennu útreiðslurnar verða skerdar, er samferðsluøkið tað økið, sum mest kennir fylgjurnar av niðurskurðunum.

Vegarbeiðini eru i:ki so nógv, sum áður, men kortini hevur verið roynt at hava tey arbeiði, sum eru í gongd, býtt út á landsins ymisku øki.

Tunnilsarbeiðið í Suðuroynni og á Streymoynni heldur fram, hóast tað er nógv slakari enn áður. Arbeiðið fram til munnan av einum komandi Gásadalsbergholi er í gongd.

Nakrar størri havnabyggingar eru framvegis í gerð, men roknast kann ikki við, at farið verður undir fleiri nýggjar

havnabyggingar fyribils, ti kommunurnar aftra seg við at fara undir slík stórarbeiði við núverandi fíggjarumstøðum.

Bæði Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir merkja fíggjarligu skerjingarnar, men kortini kann sigast, at tænastustøðið framvegis er hampuliga gott.

Smyril er farin í nýggja samferðslurutu til Skotlands, leigaður av privatum skipafelag til farmasigling. Væntandi og vónandi eydnast hetta tiltak til frama fyri bæði føroyskan útflutning og innflutning.

Ferðamannatalið á flogrutunum millum Føroya og útheimin hevur verið minkandi seinasta árið. Kappingin millum Atlantic Airways og Danair er tí eisini harðnað.

P/f Atlantic Airways hevur fingið umfíggjað flogfarið og bøtir hetta nakað um fíggjarviðurskifti felagsins.

Sum høvuðspartaeigari fylgir landsstýrið við gongdini hjá felagnum og skal eg endurtaka, at føroyska felagið er komið fyri at vera. Hetta snýr seg jú um einasta ferðamannasamband okkara við útheimin 8 mánaðir av árinum.

## 21. Undirgrundin

Nevndin, sum samgongan setti at stíla fyri samráðingum um undirgrundina, hevur sent donsku stjórnini uppskot um eitt sindur broytt kommissorium hjá serkønu arbeiðsnevndini, sum skal halda fram í arbeiðinum og finna eina endaliga loysn.

Samgongan er sinnað at fáa greitt hetta mál skjótt. Eisini tí tað kann gerast aktuelt at geva loyvi til royndarboringar eftir ráevni í undirgrundini.

**22. Viðurskifti við EF o.a.**

Samráðingarnar við EF um ein nýggja handilsskipan eru vorðnar drúgvari enn væntað.

Í fjør heyst samdust landsstýrið og ríkisstjórnin um, at besta leiðin at ganga í hesum samráðingum var at biðja um eina fríhandilsskipan, har allar vørur, ið seldar vórðu partanna millum, vóru tollfríar, tó kanska við einstøkum undantøkum. Vit vildu undir ongum umstøðum lata fiskikvotur afturfyri tollsømdir fyri føroyskan fisk.

EF hevði ógvuliga langa tíð um at taka støðu til hetta uppskot. Ikki fyrrenn í apríl í ár tók Ráðharrastovnurin í EF undir við uppskoti frá EF-nevndini um eina samráðingarheimild, sum kortini er soleiðis orðað, at hon kann umfata bæði eina fríhandilsavtalu sum hana, vit ynskja, og eina minni viðgongda handilsskipan, ið EF tykist heldur vilja hava.

Undir vitjan í Brüssel fyrst í mai hevði løgmaður høvi at hitta politiskar talsmenn fyri EF, ið søgdu seg væl skilja føroysku ynskini, harímillum, at Føroyar ikki vildu lata sær lynda einans at selja EF rávørur. Tollfrælsið skuldi eisini umfata viðgjørdar vørur.

Síðani hava samráðingar verið á embætismannastigi, higartil í trimum umførum, og verður tað fjórða væntandi um hálvan september.

Tað er einki yvir at dylja, at støðan hjá EF-umboðunum í hesum samráðingum higartil hevur verið eitt vónbrot. Tey uppskot, EF hevur sett fram um tollfrælsi á fiskavørum eru í fleiri týðandi førum avmarkað til nøgdir, ið ikki samsvara við framtíðar tørvin hjá føroysku útflutningsvinnuni.

Kortini hava vit ikki mist alla vón um, at EF skilir tørv

okkara, skilir, at tær handilssømdir, vit bjóða afturímóti, ikki eru heilt týdningarleysar, og eisini skilir sín egna politiska tørv á eini loysn, sum ikki bert teir sjálvir, men eisini vit kunnu liva við.

Landsstýrið roknar sostatt við, at semja fæst við EF um eina fríhandilsavtalu, tá ið líður út á heystið, og at hon kann fáast at virka 1. juli 1991.

Landsstýrið er farið undir at fyrireika tær broytingar, ið gerast skulu í føroysku avgjaldsskipanini, til tess at vit kunnu halda okkara part av komandi fríhandilsavtaluni.

Tá ið samráðingarnar við EF eru loknar, er ætlanin at samráðast um fríhandilsavtalur við EFTA-londini, við tí í hyggju at geva føroyskum vørum so víðar ræsur sum gjørligt í tí umfatandi europeiska búskaparøkinum, ið samráðingarnar millum EF og EFTA miða ímóti at stovnseta.

Landsstýrið roynir eisini at fylgja við í samráðingunum millum EF og EFTA um at skapa tað europeiska búskaparøkið, EES. Enn eru hesar samráðingar komnar ógvuliga stutt. Eisini fylgja vit við í tí orðaskifti um viðurskiftini við EF, ið hevur tikið seg upp í hinum Norðurlondunum.

Umframt handilsviðurskifti hevur EF nógv annað samarbeiði. Løgtingssamtyktin um, at Føroyar vera uttanfyri EF stendur við. Men ríkisfelagsskapur okkara við limalandið Danmark ger, at støða verður at taka til ymiskar týdningarmiklar spurningar í framtíðini. Skipanin av eini politiskari EF unión, um hon verður veruleiki, setur krøv til politiskar avgerðir føroyskumegin.

Rættiliga sannlíkt er tað, at EF fer at skipa fyri eini valutaunión, t.v.s. at øll limalondini fáa sama gjaldoyrisvirði. Tá ið vit frammanundan eru í gjaldoyrissamgongu við Danmark, fara vit at vera við í eini slíkari gjaldoyrissam-

gongu. Tað fer at seta krøv til skilagóðan føroyskan búskaparpolitikk í framtíðini.

Sum heild fara vit at vera við í einum størri altjóða handilssamskifti og ikki minst aftaná, at alt Eystureuropa letur sínar marknaðir upp, eiga vit at hava eyguni opin fyri øllum sølumøguleikum og øðrum samarbeiðsmøguleikum, sum til dømis joint ventures.

Vit eiga ikki at vera ræddir fyri at kanna møguleikar fyri at seta virki á stovn í øðrum londum ella at lata aðrar seta seg niður her á landi.

Heldur ikki eiga vit at vísa altjóða fíggingarstovnum burtur í at virka í Føroyum og kanska laga lóggávu okkara til slíkt virksemi.

---

Eitt ár er nú farið síðani núverandi samgonga av Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum varð skipað.

Bæði innan- og uttanlands var stórt bilsni um, at ein slík politisk samanrenning kundi fáast í lag. Men hesir flokkar sóu ta álvarsligu støðu, land okkara var komið í, og teir tóku saman hendur við tí endamáli at endurreisa føroyska samfelagið og fyrst og fremst tað búskaparliga og vinnuliga grundarlagið.

Eingin roknaði við, at tað fór at verða lætt, og øll vistu, at tað tók sína tíð. At tað fór at merkjast og kennast í hvørjum króki í samfelagnum, bæði hjá tí einstaka, hjá familjum á bygd og í bý og á arbeiðsplássunum eru øll greið um.

Stór tøk eru tikin hetta árið. Fólkið hevur borið tungar

byrðar, minni pening um hendi, goldið tvungna uppsparing, í ávísum førum vandi fyri arbeiðsplássum, láns- og kreditt-møguleikarnir hava verið verri og tyngst hevur tað kennst hjá teimum, sum settu búgv hesa seinastu tíðina, meðan grundstykkja- og húsaprísirnir vóru í hæddini orsakað av ovurvirkseminum.

Tey tyngstu búskapartiltøkini eru gjørd og tey, sum skulu fáa vinnuna aftur á føti, eru júst frá hondini. Tey, sum nú skulu fremjast, eru tey, sum aftur spakuliga skulu menna tann privata búskapin, tann hjá einstaklinginum og familjuni. Ikki við stórum studningum og almennum tænastuvirksemi, men við eini betri lønar- og skattaskipan.

Vónandi stendur politiska samgongan saman um hetta og vónandi skilir eisini andstøðan, at einki verður vunnið við opportunistiskum orðklúgvari.

Latið okkum halda fast við tað, sum vunnið er, latið okkum bøta um tað, sum ikki eydnaðist heilt, men tó er ein bati, og latið okkum halda fram við at gera tað, sum eftir er, fyri at endurreisingararbeiðið skal eydnast.